

ANNA LOUISA JOENSEN

# Í Tórshavnar skulu bæði fólk og fæ trívast

Cities for people er hugtak, sum fleiri høvusstaðir í londum uttan um okkum hava tikið til sín. Hetta ber í sær, at býarpartarnir verða samanbundnir við gøtum, har fólk kunnu ferðast trygt og gott. Eisini skulu støð verða, har hugnaligt er at steðga á sum torg og urtagarðar.

Skulu øll kunna fáa sum best burtur úr gjørdum íløgum, er neyðugt at binda býin betur saman. Tað skal bera til at lata børnini fara á súkklu av Argjum og niðan í Gundadal uttan at tey koma út í vandamikla ferðslu. Gomul, ung og rørslutarnað skulu kunna koma úr Hoyvík og oman í miðbýin uttan at verða undiroyst av vatni frá tungari ferðslu. Á síni leið gjøgnum býin, skuldi borið til at funni skjól, um eitt groft æl kom og ymiskt áhugavert skuldi verið at sæð.

Gamlir garðar sum Stórigarður kundu verði endurreistir og smá listarverk og annað, sum kann siga sína søgu, hevði eisini gjørt at ferðafólk høvdu fingið nógv meira burturúr, tá tey komu at vitja høvuðsstaðin.

Í útjaðaranum skulu eisini gerast gøtur til teirra, ið vilja út í náttúruna at renna, súkkla ella túr á hestabaki.

Øki skulu leggjast av til nógvar ymiskar aktivitetir á hesari leiðini, eitt nú mototbreyt og innhegningar til hundar at renna frítt uttan at veða til ampa hjá øðrum.

Tær gomlu bygdargøturnar, sum binda Tórshavnar stórkommunu saman, skulu eisini haldast við líka sum ein ímynd av samanhaldi. Eitt tílíkt kervi av gøtum, hevði gjørt gott fyri fólkaheilsuna bæði ta kropsligu og sálarligu vælveruna.

## UMHVØRVI

- **Havnin skal vera orkusjálvberandi**
- **Fjarhiti, jarðhiti, og vindorka økjast**
- **Krøv skulu setast nýbygging**
- **Ferðslutrygd og felagsferðsla tryggjast**
- **Gongugøtur skulu binda býin saman.**
- **Landsjørðin kring býin gerast kommunal**

Tórshavnar kommuna skal ganga á odda at gera sínar bygningar orkusparandi við jarðhita, ljóskyknum, hitapumpum og aðrari tøkni.

Royndarhús skulu byggjast, so vit kunnu granska, hvussu húsarhald kunnu brúka varandi og sparandi orkuskipanir undir føroyskum fortreytum.

Tórshavnar kommuna skal ganga á odda at fáa alternativa orku sum brennievni í bussum, ruskbilum og øðrum akførum í kommunalari tænastu.

Fyri at minka um dálkingina, skal kommunan seta fokus oljuspill, útlát og larm. Reglur og kunningarátøk um hetta skulu gerast.

Lendisætlan skal gerast fyri kommununa, so atlit verða tikin til framtíðar búseting, skrivstovuumhvørvi, langtíðarparkering, frítíð og náttúruuppliving, umframt virknan og livandi miðbý.

Í øllum samferðsluútbyggingum skulu atlit takast til teirra, ið bera brek. Spælipláss, býlingshús, ungdómshús og onnur tiltøk at skapa trivnað skulu vera í nærumhvørvinum hjá øllum borgarum.

Tórshavnar kommuna skal keypa Hoyvíkshaga, Húsahaga, Glyvursnes og Kirkjubøreyn frá landinum eins og kommunan á sinni keypti Flatnahaga. Kommunan skal síðani skipa langtíðarbyggiætlan við traðarbrúkum, rossagøtum, gonguleiðum, friðingum, skógplanting og alskyns frítíðarmøguleikum.

Garðarnir í Miðbýnum skulu latast upp. Amtmansgarðurin, Fútagarðurin og Sorinskrivaragarðurin skulu í samstarvi við privatar garðar sum Boysensgarð gerast partur av algongdum frítíðarumhvørvi í hjarta býarins. Teir partar av stóragarði, ið kunnu endurreisast skulu laðast upp aftur og gerast til alment ferðafólkamál.

## UMSORGAN

- **Kommunal ellisheim skulu byggjast**
- **Privatar eldraíbúðir skulu skipast**
- **Ansingartrygd frá vøggu í grøv**
- **Skúlaheim til lesandi**
- **Fjølbroytt frítíðartilboð**
- **Samskipað kunning, vegleiðing og tilboð til útlendingar og útisetar**

Tórshavnar kommuna skal tryggja øllum borgarum umstøður at búgva, virka og trívast. Kommunan skal streingja á at fáa greitt ábyrgdarbýti og í tí høpi staðfesta ansingartrygd – og hvør veitir hana.

Enn standa hundraðtals eldri havnarborgarar á bíðilista at sleppa á ellisheim. Alt ov fáar nýggjar eindir verða bygdar. Tað er óvirðiligt, at røktarkrevjandi eldri ikki kunnu fáa pláss á ellis- og røktarheimum, men eru noydd at verða ansað við hús.

Kommunan skal byggja nóg nógv ellisheim, sambýli og umlættingarstøð svarandi til tørvin í kommununi. Eisini skulu í býarskipanini økir setast av til privatar eldraíbúðir, so fólk kunnu selja stór hús og velja at flyta í egnaðar íbúðir, ið tey eiga ella leiga.

Smábørn, eldri fólk og fólk við serligum tørvi eiga líka sjálvsagt sum skúlabørn at hava trygd fyri, at pláss er á dagstovni, ellisheimi, røktarstovni, umlætting og tílíkum. Hetta skal skipast sum ansingartrygd.

Skal Havnin gerast universitetsbýur, skulu kollegiir vera til taks hjá øllum lesandi. Hesi skulu skipast sum partur av campusumhvørvi nærhendis skúladeplum í býnum, saman við tilboðum innan mentan, ítrótt, trivnað og frítíð.

Havnarborgarar skulu sleppa framat sera fjølbroyttum tilboðum innan frítíð og ítrótt, eftirútbúgving og menning, so sum kvøldskúla, list, sjónleik, tónleik, traðir, bátapláss, gonguleiðir, fríøki, rossaleiðir, kaffistovur, eftirútbúgving, miðbýarumhvørvi og byggilist.

Kanningar skulu gerast hvussu kommunan kann luttaka við at byggja samskipað baðiland og endurvenjingarmiðstøð.

Kommunan skal fara undir átøk at bjóða útisetum og útlendingum vælkomnum heim. Allir tilflytarar skulu fáa miðvísa vegleiðing á viðkomandi tungumáli og tilboð, so tey gerast virkin og vælkomin í býnum.